


# BOKSIN – har tú ert stjørnan

SANGKAPPING
Rókur Jákupsson Jakobsen
rokur@sosialurin.fo

**Í gjár fór eitt spennandi og øðrvísi tiltak av bakkastokki. Boksin er heitið á nýggjari sangkapping, sum Føroya Tele skipar fyri, og longu nú eru ábendingar um, at hetta tiltak verður afturvendandi. -Vit hava longu merkt ein stóran áhuga fyri tiltakinum. Hetta er jú nakað heilt nýtt – ikki bara í Føroyum, men í verðini – og tað tykist at ungdómurin tekur heilt væl ímóti hesum, sigur Høgni Vilhelmsen, samskipari við Planet.fo**

### Tað snýr seg um teg

Hugskotið til Boksina byggir á vælumtókta sangspælið "SingStar®". Hetta er eitt telduspæl, har tú syngur í besta karaoke stíli. Tað ræður um at raka teir røttu tónarnar, og harvið verða í "pitc", sum tey siga. Alt eftir hvussu væl tú dugur at raka tónarnar, fært tú stig frá telduni. Men tað verður eisini ein dómsnevnd sett, fyri at meta um, hvør ið eigur tí bestu framførsluna.

– Tað er ikki so, at tú noyðist at verða ein super, professionellur sangari fyri at luttaka. Hetta er fyrst og fremst eitt stuttligt tiltak, og tað ræður eisini um, at framføra uppá ein áhugaverdan og øðrvísan máta, sigur Høgni.

Tað sum er serliga stuttligt við hesum spælinum er, at tá ið tú letur hurðina aftur í Boksini, so er tað tú sum er stjørnan. Ongin hoyrir teg, so tú kanst veruliga loyva poppstjørnuni í búkinum framat. Og tá ið tónleikurin byrjar at spæla, hoyrir tú eisini, at talan er um tær góðu upptøkurnar, sum tú ert von/vanur at hoyra, men hesaferð er tað hvørki Pink ella Beyonce sum skal syngja...Nei, tað er tú sum leggur rødd til sangirnar.

Sostatt hevur tú møguleikan at rættað uppá útsetingina av eitt nú "Round Round" hjá Sugababes, og vísa teimum, hvussu lagið skal framførast ordiligt.

Hóast ongin hoyrir teg framføra "live", so verður tín framførsla møguliga løgd út á www.planet.fo, so tá sleppa tíni vinfólk at hoyra hvussu væl tú dugur at handfara mikrofonina.

### Hugskotið

– Fyrst av øllum vil eg siga, at við hesum tiltakinum royna vit at spíla okkum út. Hetta er eitt krevjandi tiltak, sum hevur kravt nógva orku. Hetta er ikki bara ein vanlig lýsingarherferð.

– Tað sum vit vilja við hesum tiltakinum er, at fáa enn fleiri fólk inn í okkara sølubúðir kring landið. Vit á Føroya Tele settu okkum niður saman við Petur & Petur. Saman skaptu vit hetta øðrvísi hugskot. Vit halda at tað eru ov fá "skeiv" tiltøk í Føroyum, og hetta vilja vit fegin verða við til at broyta, greiður Høgni frá.

– Tað er altíð stuttligt at skipa fyri tílíkum øðrvísi tiltøkum, tí at tú fært so gott respons frá fólkinum. Og tað er ongin loyna, at hetta tiltakið vendir sær fyrst og